

*Monika Stauss Joensen hevur havt nógvar frálíkar framførslur í Bátasavninum hjá Ossa*
*Vilmund Jacobsen*

# Hugnaløta við tónleiki, frásagnum og smakkiroyndum

HUGNALØTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Systrarnar, Monika Stauss Joensen og Andrea Stauss Hofmann, fara at undirhalda við klassiskum tónleiki, Jóannes Eliasen fer at greiða frá søguni aftanfyri Bátasavnið í Leirvík, og Jógvan Høj, stjóri á Norðfra, fer at greiða frá teimum fiskavørum, sum virkið framleiðir – og bjóða smakkiroyndir.

Komandi leygardag verður hugnaløta í Bátasavninum hjá Osmundi Justinussen í Leirvík. Á løtuni, sum byrjar klokkan 19, verður nógv áhugavert á skránni; klassiskur tónleikur, frágreiðing um søguna aftanfyri savnið, og somuleiðis verður kunnað um føroyskar fiskavørur.

Tað verða sveisisku systrarnar, Monika Stauss Joensen, sum býr í Leirvík og Andrea Stauss Hofmann, sum fara at undirhalda við violin og klaveri.

Jóannes Eliasen fer at greiða frá søguni aftanfyri Bátasavnið - og hesa søgu kennir hann væl, tí tað var pápi hansara, Klæmint Eliasen og Elias Eliasen, sum í sínari tíð bygdu húsið sum turkihús.

Úr Norðoyggjum kemur Jógvan Høj, stjóri á fiskavirkinum, Norðfra í Norðdepli. Hann er royndur innan hesa vinnu, sum hann at kalla er uppvaksin við í Árnafirði, har pápin, John Høj, hevur havt fiskavirki ein hálvan mansaldur.

Á hugnaløtuni fer Jógvan at greiða frá teimum vørum, sum Norðfra virkar, og høvið verður eisini til smakkiroyndir í steðginum.



*Jógvan Høj, stjóri á Norðfra, fer at greiða frá sínum fiskavørum og bjóða smakkiroyndir*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Monika og Andrea

Monika Stauss Joensen er eitt kent navn innan klassiskan tónleik í Føroyum, og longu sum sjey og átta ára gamlar byrjaðu musikalsku sveisisku systrarnar at spæla ávikavist violin og klaver. Sum stórar smágentur bergtóku tær fólk við áhuga fyri kamartónleiki í Zurich.

Hvørt summar spæla tær saman á ymiskum støðum í Sveits, og nú í summar fara tær at hava konsert í heimlandinum, heilt har suðuri móti markinum til Italiu. Tær eru eisini bidnar um at spæla á einum sveisiskum luksushotelli í døgunum, 1.-6. august, og tað er júst í hesum sambandi, at Andrea, sum annars er organistur í sveisiskum kirkjum og undirvísir børnum í tónleiki, er í Føroyum og vitjar systir sína.

Úr Leirvík siga tey, at øll eru vælkomin í Bátasavnið, leygardagin kl. 19.

Hjalti í Jákupsstovu:

# Ikki vist at niðurskurðirnir verða yvir ein "kamb"

**- Tá ið Fiskirannsóknarstovan fyri einum ári síðan skuldi gera sítt tilmæli til landsstýrið, var upp á tal at mæla til ymiskar niðurskurðir í veiðini hjá ávísum skipabólkum, men hetta varð so ikki gjørt í hesum føri. Óhugsandi er ikki, at tað verður gjørt í ár, sigur Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni**



*- Fiskirannsóknarstovan brúkar vanliga metingarnar hjá ICES sum grundarlag fyri síni tilráðing til landsstýrið, sigur Hjalti í Jákupsstovu*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

RÁÐGEVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

ICES er komið við sínum stovnsmetingum og ráðgeving um fiskastovnarnar, og hesar metingar fevna eisini um fiskastovnarnar undir Føroyum. Fiskirannsóknarstovan er við í arbeiðnum hjá ICES, og hon er eisini umboðað í ráðgevandi nevndini hjá felagsskapinum.

Niðurskurðirnir í ráðgevingini hjá ICES eru stórir, bæði tá ið ræður tosk, hýsu og upsa, sum eru tey týdningarmiklastu fiskasløgini hjá okkara feskfiskaflota.

## Um eina viku

Sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, skal Fiskirannsóknarstovan í seinasta lagi, 15. juni, lata landsstýrinum sítt tilmæli um veiðina undir Føroyum fyri komandi fiskiár.

Tá ið stovnurin er umboðaður í ICES, er ikki undarligt, at tilmælið hjá Fiskirannsóknarstovuni plaga at liggja nær ráðgevingini hjá altjóða felagsskapinum, sum eisini hevur føroysk "data" við í sínum metingum.

- Vanligt er, at vit brúka ráðgevingina hjá ICES sum útgangsstøði undir okkara metingum, sigur leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu.

Hann vísir á, at niðurskurðirnir í veiðini eftir toski, hýsu og upsa, sum ICES mælir til, eru ógvusligir, men hesir byggja á tær metingar og teir veruleikar, sum ráðgevandi stovnurin hevur at halda seg til.

## Ymiskir skurðir

Hjalti sigur, at tá ið Fiskirannsóknarstovan fyri einum ári síðan skuldi gera sítt tilmæli til landsstýrið, var upp á tal at mæla til ymiskar niðurskurðir í veiðini hjá ávísum skipabólkum, men hetta varð so ikki gjørt í hesum føri.

- Nú tilmæltu niðurskurðirnir eru so stórir, fara vit at hyggja upp á hesi viðurskiftini av nýggjum.

Hann vísir á, at enn er ein vika eftir, til tilmælini hjá stovninum skulu latast landsstýrinum, og tí dugir hann ikki við vissu at siga, um stovnurin fer at mæla til ymiskar niðurskurðir – ella sum vanligt hevur verið; at niðurskurðirnir verða yvir ein "kamb", sum hann tekur til.

- Tað er ikki óhugsandi, at tilmælini í ár verða ymisk fyri einstøku veiðibólkarnar, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Lesið aðrastaðni í blaðnum um stovnsmetingarnar og ráðgevingina hjá ICES.

# Tað lýsir í: Norröna setir met í ferðafólkatali

**30% fleiri ferðafólk sigldu við Norrønu í mai í ár enn í fjør, tá ið talið av ferðafólki annars setti met**

SIGLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Smyril Line vita tey at siga, at mai mánaði royndist góður, tá ið ræður um talið av ferðafólki. Hendan mánaðin setti Norrøna nevniliga met, tá ið hon flutti tilsamans 23.094 ferðafólk millum londini. Gamla metið fyri mai var annars í 2004, tá ið Norrøna flutti tilsamans 16.087 ferðafólk. Vøksturin í mai mánaði í ár er tískil eini 30% í mun til sama mánaða í fjør, og tað fegnast tey á Smyril Line rættiliga um.

- Longu nú sæst, at talið av ferðafólki í juni mánaða í ár eisini verður munandi hægri enn í juni 2004.

Á Smyril Line siga tey, at tað enn er ov tíðliga at gera neyvari metingar um, hvussu juni mánaði fer at roynast, men útlitini eru góð.

*Eftir at hava verið í tungum sjógvi, sær betur út, nú ferðafólkatalið við Norrønu setir met*

